# Einki kemur av ongum

*At røkka so góðum úrslitum, sum Royndin Fríða higartil hevur gjørt, kemur ikki av ongum.*
*Teir hava so sanniliga ikki spart seg teir seinastu mongu mánaðirnar: Venjingarnar til ársins FM-róðrar byrjaðu í desember mánaði við innandura venjingum.*
*Og í mars mánaði fóru teir á fyrsta sinni í bátin.*
*– Skal man hanga í og røkka góðum úrslitum, er neyðugt at venjingin byrjar tíðliga, slær Ingi fast.*
*– Og tað hevur eisini sín týdning, at vit allir hava vant saman allatíðina.*




**VENJING**

*Teir sjey umborð á Royndini Fríðu vandu fyrst átta ferðir um vikuna, men venja nú seks ferðir um vikuna. Hetta fer heilt vist eisini at geva úrslit í summar*

Mynd: Jens Kristian Vang